Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

# Klaksvíkar Býráð

**Dagfesting:** 22.02.2024 kl. 17:30
**Málnr.:** 21/01365 Gerðabók
**Nevndarlimir:** Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen, Tummas J. Lervig og Annika S. Biskopstø
**Varalimir:**
**Ikki møtt:**
**Onnur:** Rúni Rasmussen, kommunustjóri, og Anna H. Berg, skrivstovukvinna
**Protokollførari:** Jensa Anthoniussen, fulltrúi

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 11/24 | 24/00176-1 | Tilmæli um at seta arbeiðsbólk at kanna nýggjar bústaðamøguleikar |
| 12/24 | 23/01086-6 | á Fossum - uppskot til veganavn frá útstykkingini og niðaneftir |
| 13/24 | 24/00192-2 | Sundurbýti av matr.nr. 1323b í Klaksvík |
| 14/24 | 23/01301-2 | Umsókn um sundurbýti - uttangarðsjørðin seljast frá matr.nr. 125 |
| 15/24 | 24/00181-2 | Staðsetan av NET-bygning á matr.nr. 241a, undir Hálsi, Klaksvík |
| 16/24 | 24/00036-2 | Íløgujáttan til Varpið – *eykajáttan, seinna viðgerð* |
| **Til viðgerðar fyri afturlatnum hurðum** | | |
| 17/24 | 21/01316-35 | Umsókn keyp av lendi |
| 18/24 | 24/00159-3 | Umsókn um keyp av meirøki |

**Til viðgerðar**

## 11/24
## 24/00176-1 Tilmæli um at seta arbeiðsbólk at kanna nýggjar bústaðamøguleikar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 12.02.2024 | K-1/24 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 12.02.2024 | 14/24 |
| 3 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 13.02.2024 | K-3/24 |
| 4 Tekniska Nevnd | 14.02.2024 | 5/24 |
| 5 Klaksvíkar Býráð | 22.02.2024 | 11/24 |

**Frágreiðing um málið:**
Í skrivi dagfest 5. feb. 2024 greiðir umsitingin eitt sindur gjøllari frá málinum.
Við atlit at úrslitunum av borgarakanningini, har borgarar í kommununi eftirlýstu fleiri bústaðarmøguleikar í kommununi, hevur fyrisitingin hugt uppá, hvussu og í hvønn mun man kann økja

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

um bústaðamøguleikarnar í Klaksvíkar kommunu.
Vitandi um avmarkaða byggilendi í Klaksvík, er tilgongdin tann, at hugsast skal um annarleiðis-, tættari- og hægri bygging.

Í samband við arbeiðið er ætlanin at seta ein bólk at arbeiða við málinum. Ætlanin er at manna bólkin við umboðum frá leiðslu, teknisku fyrisiting, umhvørvis- og býarskipanarnevndini, teknisku nevnd og býráðsminnilutanum. Fyrsta uppgávan hjá arbeiðsbólkurin verður at kanna, hvørji økir í kommununi kunnu tillagast við smærri frávikum. Eftirfylgjandi skal farast í gongd við at gera tillaging og broyting í almennu byggisamtyktini.

Málsetningurin er, at arbeiðsbólkurin leggur eina ætlan fram, sum inniheldur eina stutttíðar her-og-nú-ætlan (herundir hvat kann gerast beinanvegin, og við smærri frávik í verandi byggisamtykt), eina 2-ára ætlan (tillaga byggisamtykt, gera serstaka byggisamtykt), og eina 5-10 ára ætlan (langtíðarætlan viðv. bygging í kommununi). Arbeiðsætlanin skal verða liðug í september 2024.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Arbeiðið stuðlar undir heimsmál nr. 7, 9 og 11.

**Lógargrundarlag:**
Almenna byggisamtyktin, byggilógin, bygningskunngerðin 2017 (BK17).

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Arbeiðið verður fíggjað av kontoini “byarplansútreiðslur”.

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at arbeiðið verður sett í gongd, og at fylgibólkurin verður mannaður av forfólki í UBN og TN og umboð frá býráðsminnilutanum.

**Ferðslunevndin 12. februar 2024:**
Tilmælið, dagf. 05-02-2024, verið til kunningar.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 12. februar 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 05-02-2024.

**Tekniska Nevnd 14. februar 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 05-02-2024.

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 13. februar 2024:**
Málið verið til kunning.

**Klaksvíkar Býráð 22. februar 2024:**
Býráðsminnilutin velur Anniku S. Biskopstø sum umboð í bólkinum.

Atkvøtt varð um soljóðandi broytingaruppskot frá Jógvani Skorheim: “*Mælt verður til, at vinnan eisini fær ein lim í arbeiðsbólkinum*.” Tað varð fall við 4 atkvøðum fyri (JS, SVJ, TJL og ÓML), 4 atkvøðum ímóti (KHJ, GvK, OáL og JCC,); ASJ, EÓP og ASB atkvøddu ikki.

Tilmælini frá UBN 12-02-2024 og TN 14-02-2024 einmælt samtykt. Sostatt er bólkurin mannaður við Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni og Anniku S. Biskopstø.

## 12/24
## 23/01086-6 á Fossum - uppskot til veganavn frá útstykkingini og niðaneftir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 12.02.2024 | K-8/24 |
| 2 Mentanarnevndin | 13.02.2024 | 16/24 |
| 3 Tekniska Nevnd | 14.02.2024 | K-7/24 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 22.02.2024 | 12/24 |

**Frágreiðing um málið:**
Klaksvíkar Býráð hevur á fundi 28. sept. 2023 samtykt veganøvn til vegirnar í útstykkingini á Fossum. Eftir at avgreiða í økinum er vegastrekkið frá "á Fossum" og niðan á Háls.
-
Gjøgnum tíðirnar hava verið brúkt ymisk nøvn til vegin niðan á Háls. Vit síggja dømir sum "Kærlighedsstien", Ástarbreytin, Hálsagøta o.s.fr.. Samstundis hevur vegurin á digitala kortinum seinastu árini verið skrásettur við navninum Niðan Horn (hetta ber ikki til longur, tí vegurin Niðan Horn, sum byrjar við rundkoyringina undir Fossum, endar nú á vegamótinum "á Fossum"/Fossabrúgv (ljósagulur á kortinum).
Gøtunavnanevndin hevur tí umrøtt uppskot til nýtt navn galdandi fyri vegastrekkið frá útstykkingini og víðari niðan á Háls.

Frá Gøtunavnanevndarfundi 8. des. 2023:

> ***Útstykking á Fossum – vegastrekkið frá veggripanum á Fossum og niðaneftir***
> *Nevndin heldur seg til prinsippið um, at "vegur" og "gøta" ikki er partur av nøkrum av nøvnunum í økinum, og mælir tí til, at strekkið frá gripanum "á Fossum" og heilt niðan á Háls fær navnið:*
> ***Niðan Háls***




**Burðardygd og heimsmálini:**
-

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 17 frá 6. mars 2002 um adressur

**Fíggjarligar avleiðingar:**
-

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Tilmæli:**
Vísandi til §28, stk. 5 og §41, stk.1 í Kommunustýrisskipanini verður uppskot Gøtunavnanevndarinnar við hesum latið Mentanarnevndini og býráðnum til støðutakan.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 12. februar 2024:**
Tilmælið, dagf. 01-02-2024, verið til kunningar.

**Mentanarnevndin 13. februar 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 01-02-2024

**Tekniska Nevnd 14. februar 2024:**
Tilmælið, dagf. 01-02-2024, verið til kunningar.

**Klaksvíkar Býráð 22. februar 2024:**
Tilmælið frá MeN 13-02-2024 einmælt samtykt.

## 13/24
## 24/00192-2 Sundurbýti av matr.nr. 1323b í Klaksvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 12.02.2024 | 24/24 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 22.02.2024 | 13/24 |

**Frágreiðing um málið:**
Umhvørvisstovan biður um kommununnar ummæli til umsókn um sundurbýti av matr.nr. 1323b í Klaksvík. Endamálið við sundurbýtinum er, at grundøkið við Garðaveg 38 verður býtt sundur í tveir partar: 1) Niðari partur við ábygdum sethúsum og 2) Ovari partur - óbygt grundøki - við Kjalarveg 33 til bygging av nýggjum sethúsum. Verandi vídd á matr.nr. 1323b er 652 $m^2$

Tekniska umsiting hevur hesar viðmerkingar til umsóknina:
Byggisamtyktarliga er onki til hindurs fyri sundurbýtinum. Ognin liggur í økisparti A10 við áseting um bústaða-/blandaða bygging og minsta mark grundøki til vanlig sethús uppá 300 $m^2$.
Á ætlaða frábýtta økinum standa trø, sum, eftir hvat skilst, eru innflutt úr Islandi og stava frá tíðini, tá ognin var nýtt sum læknabústaður. Nú er lendið tó privat ogn, og tí verður møgulig varðveiting/flyting av trøunum útum matrikulin at fara fram í samráð við og við samtykki frá eigaranum.





**<u>Burðardygd og heimsmálini:</u>**
<u>Mál nr. 11. Burðardyggir býir og býlingar</u>. Gera býir og búsetingar inkluderandi, tryggar, haldgóðar og burðardyggar
<u>Mál nr. 15: Lív á landi</u>: Verja, endurbøta og virka fyri burðadyggari nýtslu av jarðvistskipanum, á burðardyggan hátt røkja skóg, berjast móti oyðimarkarmyndan og steðga og venda landtýningum og lívmargfeldismissi

**<u>Lógargrundarlag:</u>**
Matrikullógin

**<u>Fíggjarligar avleiðingar:</u>**
Ongar – kommunan bert ummælandi partur

**<u>Tilmæli:</u>**
Vísandi til omanfyrinevnda  mælir tekniska umsiting til

- at viðmæla sundurbýti, við tí treyt at hvørgin av sundurbýttu pørtunum verður minni enn 300 m2
- at býarfríðkanardeildin/býargartnarin – áðrenn loyvi verður givið til útgrevstur - metir um varðveitingarvirði av trøunum, og útfrá tí verður støða tikin til, um nakað skal gerast fyri at fáa tey flutt á annað stað.

**<u>Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 12. februar 2024:</u>**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 05-02-2024.

**<u>Klaksvíkar Býráð 22. februar 2024:</u>**
Tilmælið frá UBN 12-02-2024 einmælt samtykt.

## 14/24
## 23/01301-2 Umsókn um sundurbýti - uttangarðsjørðin seljast frá matr.nr. 125

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Svínoyarnevndin | 30.01.2024 | 3/24 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 12.02.2024 | 25/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 22.02.2024 | 14/24 |

**Frágreiðing um málið:**
Umhvørvisstovan biður um kommununnar ummæli til umsókn um sundurbýti í Svínoy, við tí endamáli at uttangarðsjørðin hjá matr.nr. 125 verður flutt til matr.nr. 99.

Tekniska umsiting hevur hesar viðmerkingar til málið:

Verandi ognarviðurskifti, matr.nr. 125: Jógvan Sakaris Eliasen
Innangarðs: í trimum lutum: 2.177 $m^2$ + 3.145 $m^2$ + 3.306 $m^2$ = 8.628 $m^2$
Uttangarðslutur: matr.nr. 156a – Handantúnstriðingur, Fyri norðan – 00-03-12½

Verandi ognarviðurskifti, matr.nr. 99: Frímund Hansen
Innangarðs: 2.257 $m^2$
Uttangarðslutur: matr.nr. 156a – handantúnstriðingur, Fyri norðan – 00-01-00

Við umsóknini veksur uttangarðsluturin hjá matr.nr. 99 til 04-12½, meðan matr.nr. 125 ikki longur eigur part uttangarðs.

**Burðardygd og heimsmálini:**
-

**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – kommunan bert ummælandi

**Tilmæli:**
Við tað, at talan bert er um umskipan uttangarðs, og sostatt liggur uttanfyri økið, sum arbeitt verður við byggisamtyktini, hevur tekniska umsiting onki í móti, at umsóknin verður viðmæld.

**Svínoyarnevndin 30. januar 2024:**
*Frímund Hansen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 20-11-2023.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 12. februar 2024:**
Nevndin tekur undir við Svínoyarnevndini 30-01-2024.

**Klaksvíkar Býráð 22. februar 2024:**
Tilmælið frá UBN 12-02-2024 einmælt samtykt.

## 15/24
## 24/00181-2 Staðsetan av NET-bygning á matr.nr. 241a, undir Hálsi, Klaksvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 12.02.2024 | 18/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.02.2024 | 12/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 22.02.2024 | 15/24 |

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagf. 1. feb. 2024, ið greiðir gjøllari frá málinum.

NET hevur sent umsókn, um Klaksvíkar kommuna er sinnað at lata øki til tøknihús. NET hevur tørv á at byggja eitt tøknihús á vestara armi í Klaksvík. Húsið skal nýtast í samband við útbreiðslu av fipursambandinum. NET skjýtur upp part av matr.nr. 241a, grøni geirin undir Hálsi, við síðuna av trafostøðini hjá SEV. Tøknihúsið verður uml. 30 $m^2$ til støddar.

Byggi- býarplansbólkurin hevði 14. des. 2023 tøknihúsið til umrøðu:
Økið er útlagt sum fríøki (D14) og ikki ætlað til bygging, men undantøk eru, tí frammanundan stendur eitt SEV hús í økinum. Somuleiðis er talan um eina neyðuga víðkan av fipursambandinum í kommununi. Bólkurin sær positivt uppá ætlaðu bygging tó við treytum/krøvum, so sum at bygningssniðið er siðbundið við møn á miðjuni og tekur støði í SEV húsinum, hevur timburklædning, hevur somu hædd/kotu sum SEV húsið, so hesi liggja ájavnt og harvið deila tún og trappu, at húsið verður so lítið, sum til ber, og annars at halda almennu ásetingarnar (frástøða til mark, veg v.m.).

Økisásetingarnar fyri D14 loyva ikki bygging í økinum, tí verður neyðugt at geva undantaksloyvi ella broyta byggisamtyktina.

Verandi býarhegn verður ávirkað av byggingini. Hetta kann loysast við, at býarhegnið verður flutt omanum bæði húsini. Arbeiðið skal gerast í samráð við býargartnaran, somuleiðis skal tann, ið hevur brúksloyvi til trøðna og seyðahúsið omanfyri, kunnast.

Matrikulering:
Í samband við ætlaðu bygging verður mælt til at stovna tveir sjálvstøðugar matriklar til SEV- og NET-húsini.
Víst verður til Løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m. §17, stk. 2. b. og c.
Matr.nr. 241a er kommunalt øki. Kommunan hevur áður latið lendi til tøknihús, t.d. á Helnabrekku.

**Burðardygd og heimsmálini:**
MÁL 11. Gera býir og búsetingar inkluderandi, tryggar, haldgóðar og burðardyggar

**Lógargrundarlag:**
Almenna byggisamtyktin, D14 (fríøki)
Løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Kommunan verður hildin kostnaðarfrí av arbeiðnum at byggja tøknihúsið, tí NET ber allar útreiðslur.
Kommunan ber kostnaðin av matrikulering, konta: *byggibúning bústaðir*.

**Tilmæli:**
Uppskot til staðseting og avgerð um undantaksloyvi til bygging av tøknihúsi í D14, og at sundurbýta SEV- og NET-húsini í sjálvstøðugur matriklar verða latin nevnd og býráð til støðutakan.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 12. februar 2024:**
Nevndin tekur undir við staðsetingini og undantaksloyvinum til bygging av tøknihúsi í D14, og at sundurbýta SEV- og NET-húsini í sjálvstøðugar matriklar, sum lýst í tilmælinum, dagf. 01-02-2024.

**Fíggjarnevndin 20. februar 2024:**
Nevndin tekur undir við UBN 12-02-2024, og at leigusáttmáli verður gjørdur við NET um lendið.

**Klaksvíkar Býráð 22. februar 2024:**
Tilmælið frá FíN 20-02-2024 einmælt samtykt, og at leigusáttmáli eisini verður gjørdur við SEV.

## 16/24
## 24/00036-2 Íløgujáttan til Varpið – *eykajáttan, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 16.01.2024 | 1/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.01.2024 | 1/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 25.01.2024 | 7/24 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 22.02.2024 | 16/24 |

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 25. januar 2024.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Um stuðulin skal veitast til Mentanarhúsið, skulu kr. 5. mill. flytast frá aðrari íløgu og/ella fremjast sum ein eykajáttan.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at nevndin tekur støðu til málið.

**Mentanarnevndin 16. januar 2024:**
Nevndin tekur undir við, at 3 mió.kr. verða latnar Mentanarhúsinum í íløgustuðuli; peningurin verður at játta av *tøkum peningi.*

**Fíggjarnevndin 23. januar 2024:**
Nevndin tekur undir við MeN 16-01-2024.

**Klaksvíkar Býráð 25. januar 2024:**
Tilmælið frá FíN 23-01-2024 einmælt samtykt.

**Klaksvíkar Býráð 22. februar 2024:**
Tilmælið frá Býráðnum 25-01-2024 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

**FRAMMANFYRI STANNDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI**

**17/24**
**21/01316-35 Umsókn keyp av lendi**

**18/24**
**24/00159-3 Umsókn um keyp av meirøki**

*Fundurin lokin kl. 19:30*